

## TB flytur upp

Broytingar í 1. deild hjá monnum hava nú við sær, at 2. deildarliðið hjá TB sleppur at spæla í 1. deild í vetur. Orsøkin er, at Fleyr hevur valt at tikið annað av sínum mansliðum úr 1. deild, og tá pláss var fyri einum liði aftrat í deildini, slapp TB upp. Og samstundis sum TB sleppur upp, er eisini blivið pláss fyri einum liði aftrat í 2. deild, og tað plássið fær nú Nøvan. Bæði fyri 1. og 2. deild er gjørd nýggj kappingarskipan, sum lagar seg eftir hesum broytingum, og somuleiðis hava tær við sær, at dagfestingarnar fyri onkrar dystir eru farnar, so har hevur Flogbóltssambandið heitt á feløgini um at finna nýggjar dagfestingar fyri teir dystirnar. Annars heldur kappingin fram eftir nýggju skipanini.

### SÍ-Mjølnir 2-3 (9-25, 25-14, 17-25, 25-18, 15-17)

# Mjølnir bestu menninar

**Enn eina ferð noyddist SÍ út í fimm sett, men hesa ferð bar ikki á mál, tí í síðstu bóltunum royndust menninir hjá Mjølnir betur og vunnu settin og dysti. Sigurin merkir samstundis, at Mjølnir hevur lagt seg á odda í Eikliguni hjá monnum**



Menninir hjá Mjølnir vóru ovurfegnir, tá sigurin var vunnin í Sørvági í gjár. Eftir fýra skiftandi sett gjørdist neyðugt við einum fimta og avgerandi setti, og har streyk Mjølnir avstað við øllum í evstu løtu

Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir




Hilmar Jan Hansen

Fyri viku síðani mátti SÍ spæla fimm sett, áðrenn sigurin á Fleyr var fingin til høldar, og í gjár máttu aftur fimm sett til í mansdystinum í Sørvági. Munurin var bara, at hesa ferð tapti SÍ fimmsettaran, og tað merkti somuleiðis, at SÍ mátti lata oddasessin frá sær til Mjølnir.

Dysturin í Sørvági í gjár fekk annars eina sjáldsama byrjan. Thorvald Danielsen servaði, og tað gjørdi hann so væl, at Mjølnir kom á odda 14-0, sum vælsaktans er óhoyrt, tá talan er um dyst á hesum stigi!

– At vit koma á odda 14-0, er eitt sindur óvanligt, og eg haldi, at teir í SÍ kanska blivu eitt sindur kløkkir. Men at standa soleiðis og serva 14 stig á rað frá fyrsta bólti, haldi eg ikki, at eg fyrr havi roynt í bestu deildini. Men tað var deiligt, segði Thorvald eftir dystin, ið gjørdist drúgvur og sera umskiftandi fyri báðar partar.

Jón Joensen hjá SÍ viðurkendi eisini eftir dystin, at byrjanin var øgiliga vánalig, men hann helt, at tað vóru nervar, ið gjørdu seg galdandi.

– Eg veit ikki, um eg nakrantíð fyrr havi verið aftanfyri 0-14 í bestu deildini, og tað var eisini ringt at koma afturíaftur. Men vit royndu at byggja okkum upp og fáa spælið at koyra hampuliga, uttan at tað tó gjørdist nóg gott. Tá vit kunnu koma so langt við at spæla so illa, sær tað allíkavæl bara heilt gott út, segði hann.

Sum vera man, vann Mjølnir fyrsta settið sera sannførandi, men í øðrum setti svaraði SÍ aftur og vann næstan líka sannførandi. Í triðja setti fylgdust liðini, heilt til Mjølnir var á odda 19-17, og síðani vann SÍ ongan bólt aftrat. Men enn eina ferð megnaði SÍ at svara aftur í fjórða setti, tá liðið var á odda 21-18, tá tað steðgaði fullkomuliga upp hjá Mjølnir.

### Mjølnir hevði munin

Nú gjørdist tí neyðugt við einum fimta og avgerandi setti, og har gjørdist tað akkurát so spennandi, sum væntast kundi. Tey fýra undanfarnu settini vóru kanska ikki so væl spæld, men intensiteturin var har alla tíðina, og tað var ikki til at siga, hvønn veg eitt fimta sett kundi fara.

Liðini fylgdust eisini allan vegin uppeftir, men kanska sá SÍ út til at vera heldur betur fyri. Eitt nú vóru sørvingar frammanfyri 13-11, umframt at teir fingu javna til 15-15, tá Mjølnir annars hevði havt sín fyrsta sett- og matsbólt, men so tóku klaksvíkingarnir um endan og vunnu teir báðar síðstu bóltarnar.

– Hetta var ein øgiliga javnur dystur, har vit skiftust um at vinna settini, og tað kundu akkurát tað sama verið teir, sum vunnu, sum at tað blivu vit. Men vit vunnu so nakrar øgiliga týdningarmiklar bóltar síðst í fimta setti, ið avgjørdu alt til okkara fyrimun, segði Thorvald, ið heldur liðini vera so mikið jøvn í ár, at tú mást spæla væl í øllum settum, skalt tú vinna.

Hinvegin kundu Jón og teir í SÍ bara staðfesta, at tað, sum riggaði fyri einari viku síðani, tá tað eisini var neyðugt við fimm settum, bara ikki riggaði hesa ferð.

– Eg haldi, at munurin var tann, at vit í dag ikki kláraðu at halda konsentratiónina allan vegin. Menn virkaðu troyttir, og hetta var aftur ein langur dystur, har vit bara ikki kláraðu tað síðsta. Vit fara óivað at kappast við Mjølnir í oddanum í vetur, men um vit bara spæla betur enn í dag, so skulu vit nokk klára teir, segði Jón Joensen.

### Fleyr-ÍF 3-0 (25-22, 25-22, 28-26)

# Máttleysir meistarar

Menninir hjá ÍF, sum í fjør vunnu greipuna og gjørdust meistarar væl undan seinasta umfari, hava ikki megnað tað stóra í ár. Ein orsøk er sjálvsagt, at hvørki Rúni Weihe ella Bartal Eliasen eru við, og tað sæst aftur – eins og tað hevði gjørt tað hjá øllum øðrum.

Fríggjakvøldið var ÍF í Havn og spældi ímóti Fleyr, og enn eina ferð máttu greipuvinnararnir fara tómhentir av vølli, tí Fleyr vann ein 3-0 sigur, ið á vøllinum var uppaftur meira sannførandi, enn tølini kundu bent á.

Í teimum báðum fyrstu settunum hevði Fleyr munin, og hóast ÍF fekk lyft seg upp í triðja setti og enntá hevði settbólk, 25-26, eydnaðist ikki at fáa avgjørt til egnan fyrimun, so Fleyr vann bæði settið og dystin.

**hil**



Fleyr hevði ikki stórvegis trupulleikar við at basa greipuvinnarunum úr Fuglafirði

Mynd: Álvur Haraldsen